# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ingálvi til minnis

Nakrir penslar
liggja og sova
í einum skála,
har Ingálvur
plagdi at mála.

Summir eru gráir
og ikki so fáir
eru svartir,
og onkur ljóst grønur
sum mosi í flotkeldum
ella eins og grønkandi
várligur bøur.

Har eru penslar stórir og smáir,
og onkur er bjart reyður,
nú Ingálvur er deyður.

Hesi penslabørn
leingjast eftir
sínum flógvu faðirshondum,
sum so trygt
leiddi tey út
á stórar fløtur
í ókendum londum –
leitandi eftir farvukornum,
sum hava sínar røtur
í svørtum homrum
og gráum stýggjum -
leiftrandi í mosalittum
vindum lýggjum -
undir korkalittum
flógvum fjallarókum.

Sovið penslabørn
undir fjallakrókum
til tykkar uppreisnarstund,
tá ið tit aftur skulu á fund
saman við tykkara faðir,
sum nú dvølur í Mamrelund
í sínum litríku myndum
saman við drotti
í andans rómi,
sum er ein litríkur
symfoniskur
himnatóni -
í myndunum hjá Ingálvi,
nú hann penslarnar
frá sær legði.

Friður veri við penslabørnunum
hjá Ingálvi av Reyni!

**Frits Johannesen**

## 99 ára føðingardagur

Hósdagin 1. desember verður Andreas Andreasen, Oyndarfjørður, 99 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 3. desember í handilskjallaranum frá kl. 17-21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# Árni Arge skal stjórna Petrunum

**Fyrrverandi stjórin á Fiskasøluni hevur keypt seg inn í reklamuvirkið Petur & Petur og Vikublaðið**



STJÓRASKIFTI

Reklamuvirkið Petur & Petur er marknaðarráðgevi fyri fyritøkur og stovnar og framleiða og umsita grafiskar uppgávur og prentlutir, umframt samskipa og seta upp messubásar og framsýningar. Felagið varð stovnað í 1999 og hevur í dag 12 fólk í starvi. Hartil egur virkið eisini Vikublaðið, sum rekur blaðvirksemið og ferðaskrivstovuna VikuTur.

Árni Arge hevur keypt part av partapeninginum, og á eykaaðalfundi tann 21/11 varð hann settur sum stjóri í báðum feløgunum. Petur Slyne og Petur Mohr er farnir frá. Árni Arge hevur sostatt dagligu leiðsluna av báðum feløgunum. Endamálið við hesum er at styrkja um fíggjarligu og fyrisitingarligu stýringina av feløgnum. Við hesari umskipan verður nú møguligt hjá fráfarnu stjórunum og eigarunum í enn størri mun at leggja sína orku í tann kreativa partin og at menna virksemið.

Árni Arge er 41 ára gamal og er útbugvin cand. Merc. í 1993 á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn. Árni hevur síðani juni 2005 starvast í fyritøkuni sum ráðgevi og fyrisitingarligur leiðari. Hann hevur áður starvast bæði sum fíggjar- og forstjóri á Faroe Seafood, umframt at hann hevur starvast í Danmark í fleiri ár, meginpartin av tíðini hjá amerikonsku/altjóða fyritøkuni Kraft Foods.

Katrin Holm Norðfoss:

# 25 ára starvsdag hjá Reyni Service



Hósdagin 1. desember 2005 hevur Katrin Holm Norðfoss starvast í 25 ár hjá Reyni Service í Hoyvík. Hetta var sama ár, sum Reyni Service fór at selja Toyota bilarnar.

Katrin hevur arbeitt á skrivstovuni við bókhaldinum og øðrum, sum skrivstovuarbeiðið inniber.

Katrin er ættað úr Hvalba, dóttir Mainu og Oliver Holm. Hon er gift Sigmundi Norðfoss úr Havn, og eiga tey bæði synirnar Aksal og Paula.

# Prógv sum sjúkrarøktarar




*18. november 2005 hava hesar tríggjar lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingar á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya: Ingunn Jacobsen, Toftir, Elisabeth W. Johannesen, Tórshavn, og Súsanna Funding, Tórshavn.*